DAGSINS MEINING

Stongið ikki Svimjihøllina!

Nú so nógv verður tosað og skrivað um heilsuspurningar, og okkara landsstýrismaður í heilsumálum hevur gjørt føroyska fólkaheilsu til sítt hjarta- og stríðsmál, munnu helst flest allir føroyingar taka undir við honum, føroyingar. Hvør ynskir sær og øðrum ikki eina góða heilsu!

Men eitt eru orð, annað eru gerðir. Spurningurin er bara, hvussu komið verður víðari enn til bert eina stevnu og mál og mið. Tað krevur sjálvandi nakað av hvørjum einstøkum, men tað er eisini gott, um tað almenna, stovnar, feløg og sjálvt ráðharrar og landsins stjórn medvirka í hesum, eitt nú við at skipa fyri tiltøkum og ráðstevnum. Her tykist so longu at vera hent nakað. Enn ein heilsuráðstevna í eini rað av tiltøkum varð sett í gjár. Og gott í tykkum, sum fáa hetta í lag. Her mugu so fjølmiðlarnir eisini ganga undan og vera við til at geva sítt íkast.

Í allari hesari stóru ætlan eru tað so aftur smálutirnir og tær einstøku gerðirnar, sum telja. At tað í tí smáa, í hvørjum króki kring landið, verður gjørt nakað ítøkiligt til tess at fremja eina góða fólkaheilsu. Og hetta kann verða gjørt uppá hundraðtals mátar. Og fyri at koma við einum ítøkiligum íkasti, sum veruliga munar hava vit so eitt ítøkiligt uppskot til alt býráðið í Havn við bæði nýggja og fráfarandi borgarstjóranum á odda. Sitandi borgarstjórin kennir til tað, nú rørsla er so inn í hansara umhvørvi. Og sjálvur hevur komandi borgarstjórin røkt starvið sum ÍSF forseti í mong ár, og frá tí umhvørvinum veit hann tí fullvæl, hvønn týdning góð motión/rørsla hevur fyri okkara ungu og tilkomnu. Men tað er ikki altíð, at henda rørsla nýtist at stava frá kapping. Hon kann full so væl stava frá vanligum tiltøkum og gerðum í gerandisdegnum hjá mongum fólkum. Og her skal okkara ítøkiliga uppskot til býráðið alt vera: stongið ikki Svimjihøllina í Gundadali í desember mánað, tá fólk hava mest tørv á henni. Tá, vita vit av royndum, hvussu stressað øll eru, hvussu nógv verður etið og drukkið og harvið eisini, hvussu lítil rørslan hjá mongum er. Eisini er vert sum heild av hava í huga týdningin av nettupp rørslutiltøkum í jólamánaðinum. At hesi verða tikin frá fólki hesa tíð er tann øvugta gongdin, skal tosið um betrøða fólkaheilsu gera nakran mun.

Fyri tey mongu, sum dagliga leggja sær leiðina niðan í Svimjihøllina í Gundadali er tað eitt risastórt afturstig og einki minni enn ein vanlukka, at høllin bráddliga verður stongd allan jólamánaðin og nakað eftir tað. Tað er tá vit hava brúk fyri høllini. Tí henda inniliga áheitan á býráðið: stongið ikki svimjihøllina. Finnið aðrar útvegir, flytið ella styttið um tíðina, tá høllin skal vera afturlatin. Gott í tykkum. Kanska landsstýrismaðurin í heilsumálum, nú hann er so íðin at vilja tryggja okkum eina góða heilsu, eisini letur eitt vælmeinandi og heilsugott orð falla hjá býráðnum og harvið eisini hjá sínum nýggja og umstríddu floksfelaga.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Búskapar og løgfrøðingafelagið og rættartrygd

Hans Birgir Hansen

Búskapar- og løgfrøðingafelagið skapar onga rættartrygd, tá talan er um at fáa hondhevja landsins løggávur, skipanir, dagligar mannagongdir, kunn- og reglugerðir, við meira!

Sjálvt avvarðandi myndugleikar og valdir, klára ikki at fáa hondhevja áðurnevnda og fremja tillagingar innan miðfyrisitingar, at tæna øllum landsins borgarum eins í Havn!

Hvat skulu vit hava nógvu embætisfólkini til í miðfyrisitingunum, ið ikki arbeiða fyri sínar feitu lønir, við viðbótum í dag ið ikki fá avrikað eins nógv sum skrivstovufólki í Havn!

Hví hava vit síðan fyrst í sjeytiárunum sett danskar og útlendskar løggávur, skipanir, mannagongdir, kunn- og reglugerðir í gildi í Føroyum, ið síðan eru umsett til føroyskt!

Eg vil siga vit hava stak vánaligt, løggávu, dóms, útinnandi valdir, ið ikki fáa ílag, dagføringar og tillagingar, innan miðfyrisitingar, ið ein dagliga hevur stríðst við í Havnini!

Tað sama er galdandi innan kommunalar, og privatar og ríkis, miðfyrisitingar, í Tórshavnar/Suðurstreymoy og tá avgreiðslufólkini – málsviðgerarar, ikki viðgera øll eins!

Tað er alt grundleggjandi skeivt og órættvíst skipað og innrætta miðfyrisitingar í ikki tillaga seg at tæna øllum landsins borgarum eins, uttan mun til høgu og lágu borgarar!

Tað er einki sum eitur at sýna nakran solidaritet mótvegis hvørjum øðrum sum starvsfelagar og fakfelagslimir, tá ið hugt verður eftir teim í miðfyrisitingunum í Havnini í dag!

Tað er tá ein viðger fakfelags ruðuleikar við atliti til tað almenna, landi, kommunur, privata, ríkið, ið avdúka sín ósolidaritet, við fleiri álitisstørvum og hjáarbeiðum í Havn.

Eg havi áður viðgjørt advokatstættir – dómstólar – ákæruvald, tá hesi skipa rættarting, og stættirnir fáa rættarmál á dagsskránna, ið hongur í forhøllum í dómhúsunum!

Danska løgreglan á politistøðunum, kring alt landið viðgera ikki allar landsins borgarar eins við atliti løggávur, skipanir, dagligar mannagongdir, kunn- og reglugerðir!

Felags fyri øll er at tey skilja ikki at vera til fyri landsins borgarar og ikki øvugt soleiðis sum samfelagsstøðan er í dag úti í hvørjari av landsins kommunum í oyggjunum.

Frágreiðing Búskaparráðsins november 2004

Óli Samró

Boðað verður hervið frá, at undirritaði ikki er ein partur av frágreiðingini: Inntøkustøðið í Føroyum - hví eru vit so rík, men ikki eins rík og hini? Búskaparráðið, november 2004.

Tíverri havi eg havt forfall til fundirnar í heyst og tí ikki verið við til viðgerðina av innihaldinum.

Vetur

kavaroksódn
vetrarmoyggin sveipt í
svartan gráan brúnan búna

stormhetjan ríður á
vetrarsins snjógangara

snjófuglaskalvar fjalt foldina

samankropin gráspurvur
vil yvirliva liva
bíðar eftir várinum

fuglaljómurin tagnaður
blómurnar sova

meðan
spæla børnini í kavanum

áin fryst sílini vorðin
til ísklumpar

snjógangarin missir vársólina

snjógangarin í blánanum
á veg innar í várið.

í fjarleikanum kærleikin
framtíðarinnar loynivitska

Sólmundur Joensen

Innsent tilfar
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða ráðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstoðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Fri. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

Í sátt og semju á Tvøroyri

Fyri fyrstu ferð í fleiri mannaminni, hevur Tvøroyrar Býráð skipað seg í sátt og semju. Skattalætti, hóvligur fíggjarpolitikkur og ætlanin at flyta heilsuskúlan til Vágs, verða nøkur høvuðsmál hjá nýggja býráðnum

BÝRÁÐSPOLITIKKUR
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Soleiðis sá nývalda býráðið á Tvøroyri út, tá ið tað mánakvøldið valdi borgarstjóra tey næstu fýra árini. Sum sæst, eru allar hendur á lofti, tí tað varð gjørt í sátt og semju. Frá vinstru eru tey Bergur Bærendsen á samgongulistanum, Marjun Olsen og Jásvur Vang úr sambandsflokkinum, Jens Johannesen, Pauli Einarsson og Sverri Midjord úr javnaðarflokkinum, Óli Debes, býráðsskrivari og fyri borðendan situr Kristin Michelsen, borgarstjóri, úr javnaðarflokkinum

Tá ið Kristin Michelsen mánakvøldið varð afturvaldur til borgarstjóra á Tvøroyri í fýra ár afturat, var tað við atkvøðunum frá øllum sjey býráðslimunum á Tvøroyri í rygginum.

Og hetta er fyrstu ferð so langt nakar minnist, at eitt býráð á Tvøroyri hevur skipað seg í sátt og semju.

Annars hevur altíð verið talan um eina samgongu og eina andstøðu og mangan hevur tað eisini leikað rættiliga hart á ímillum báðar partarnar í býráðnum.

Men tað var longu uppundir valið, at tosað var um betri samstarv í Býráðnum og tað var enntá komið heilt langt við eini felags uppstilling, har allir flokkar skuldu stilla upp á einum og sama lista.

Tað miseydnaðist, so ístaðin varð stillað upp á trimum listum.

Úrslitið var, at javnaðarflokkurin fekk fýra býráðslimir og kundi sostatt skipað samgongu einsamallur. Sambandsflokkurin fekk tveir býráðslimir og samgongulistin, sum er ein samansjóðing av fólkaflokkinum, tjóðveldisflokkinum og miðflokkinum, fekk ein býráðslim.

Men kortini eydnaðist at telva so væl á Tvøroyri, at allir flokkarnir samdust um at velja Kristin Michelsen á javnaðarlistanum til borgarstjóra og Paula Einarsson á sama lista til varaborgarstjóra.

Men annars vórðu nevndirnar býttar sundur ímillum allar flokkarnar, so at øll fingu nakað.

Vænta fruktagott samstarv

Tá ið býráðið hevði skipað seg mánakvøldið, vóru tað fleiri býráðslimir, sum fegnaðist um, at tað hevði eydnast at finna samju. Tað gjørdu bæði borgarstjórin, varaborgarstjórin og Bergur Bærendsen úr samgongulistanum og teir váttaðu allir tríggir, at teirra lutur skuldi ikki liggja eftir í royndunum í at fáa eitt fruktagott og heppið samstarv.

Men tað ivaðist teir heldur ikki í, fór at verða úrslitið.

Tað var eisini onkur, sum kallaði hendan fundin fyri tann besta í býráðnum nakrantíð.

– Tað hevur stóran týdning at samstarva, serliga fyri at kunna standa seg í kappingina við onnur øki í landinum, tí tað stendur nógv upp á spæl í løtuni.

Býráðslimir á Tvøroyri mettu eisini, at samjan í Tvøroyrar Býráð var eitt greitt tekin til restina av Suðuroy um samstarv og ganga saman í samvinnu.

– Næsta stigið átti at vera at fáa alla Suðuroy at standa saman fyri at fáa drigið nakað til oynna, halda býráðslimir á Tvøroyri.

Kristin Michelsen heldur, at tað hevur stórar fyrimunir at alt býráðið er savnað.

– Í kommununi føra vit kommunupolitikk, sum skal tæna borgarunum og ikki partapolitikk og við at savna alt býráðið, fáa allir býráðslimir ábyrgd og tað kann bara gagna kommununi, sigur borgarstjórin.

Hann sigur, at hetta er eitt úrslit av, at allir flokkarnir høvdu semju og samstarv rættiliga frammiliga í valskránni til hetta býráðsvalið.

– Og nú vit arbeiða hart fyri at leggja kommunur saman, er tað rættast at byrja hjá sær sjálvum við semju og samstarvi og tað gekk rættiliga gott hjá øllum býráðslimunum at finna semju, sigur hann.

Skattalættin

Umframt samanlegging, heldur Kristin Michelsen, at eitt høvuðsmál hjá nýggja býráðnum verður at føra ein hóvligan fíggjarpolitikk, soleiðis at tað skal bera til at lækka skattaprosentið.

– Vit mugu gera alt fyri at kunna lækka skattin eftir at tvørafólk hava livað við landsins hægsta skattaprosenti í meiri enn 10 ár.

Men hann sigur eisini, at ætlanin hjá landsstýrinum við at flyta ætlaða heilsuskúlan á Tvøroyri og ætlaða miðnámskúlan í Vági til Hovs og at byggja røktarheim í Vági ístaðin, er eitt stórmál hjá Tvøroyrar Býráð at arbeiða við.

– Vit halda at framferðin hjá landsstýrinum í hesum máli hevur verið ómetaliga óstortslig. Tvøroyrar Býráð hevur lagt sera stóran dent á heilsuskúlan og hóast talan er um eitt landsmál burturav, hevur kommuman eisini brúkt heilar tvær milliónir upp á skúlan fyri at geva honum so góðar umstøður, sum tilber.

– Hetta hava vit gort, tí landsstýrið hevur alla tíðina givið til kennar, at skúlin skuldi vera á Tvøroyri.

– Tí skilja vit ikki, at Landsstýrið kemur fram við eini ætlan um at flyta skúlan, uttan at tosa við kommununa fyrst, so at vit ístaðin frætta um ætlanina í fjølmiðlunum.

Tað skilst annars, at landsstýrið ætlar at tosa við allar kommunurnar í Suðuroy í januar ella februar um ætlanina.

– Nú bíða vit so bara eftir at fáa fundarboð frá landsstýrinum, so fáa vit at siggja. Men tað skuldi landsstýrið havt gjørt beinanvegin ístaðin fyri at fara til Vágs Býráð einsamalt við einum uppskoti, sum eisini ávirkar Tvøroyri, sigur Kristin Michelsen.

Týdningarmikið valskeið

Annars meta fleiri býráðslimir á Tvøroyri, at tey næstu fýra árini verða eitt tað týdningarmesta valskeiðið á Tvøroyri í mannaminni.

Tá ið Tvøroyrar Kommuna skyldaði mest, var skuldin næstan 180 milliónir, sum var útvið sjey álíkningar.

Næsta ár gongur avtalan um skuldina út og tá er skuldin komin niður á góðar 60 milliómir, sum er minni enn hálvonnur álíkning.

Sostatt hómast eisini eitt størri fíggjarligt rásarrúm hjá býráðnum.

Men borgarstjórin ávarar ímóti at leypa framav.

– Vit noyðast at føra ein hóvligan fíggjarpolitikk so at vit ikki enda í óføri einaferð aftur. Tí skal byggjast út við skili, leggur hann dent á.

Og at føra ein fíggjarpolitikk, sum ger tað møguligt at lækka skattin, liggur sera frammaliga hjá borgarstjóranum.

Annars treyt í valstríðunum ikki við hugskotum um, hvat skuldi gerast á Tvøroyri. Okurt valevni vildi hava nýggjan fótbóltsvøll, eitt annað nýggja svimjihøll og eitt tríðja sambýli.

– Hetta eru alt mál, sum eru í eini framtíðarætlan, men tað verður hvørki næsta ár ella í 2006, sigur Kristin Michelsen.

– Hvat sambýli til eldri viðvíkur, er støðan ein heilt onnur. Har er býráðið púra samt um, at talan er um eitt landsmál. Men í tí løtu, tað verður eitt kommunumál, eru vit til reiðar at fara undir eitt sambýli.

– Hóast talan er um eitt landsmál, hevur kommunan útvega eitt fyribils sambýli til nøkur fólk í einum sethúsum, sum eru keypt til endamálið.

Annars heldur Kristin Michelsen at tað einasta rætta er, at allar kommunurnar í Suðuroy seta seg saman og kanna eftir, hvør tørvur er á eldraøkinum í oynni sum heild soattær kunnu byggja út í felag eftir eini heildarmeting av tørvinum sum er í allari oynni.

– Tað er ikki skilagott, at tær einstøku kommunurnar byggja út hvør sær, sum best ber til, uttan at hugsa um heildartørvin í allari oynni.

– Men tað er eisini ein orsøk afturat til at leggja alla oynna saman í eina kommunu sum skjótast.